skuldi haldgóðskan eisini verið góð, og so eru allar fortreytirnar í lagi.

- Men sjálvandi spælir marknaðarstøðan eisini inn. Tað eru jú trý ár, síðani Landastrok kom, og tí var marknaðurin svangur eftir einum nýggjum spæli. Samstundis hevur tað kanska eisini spælt inn, at tað vóru lutfalsliga nógv, sum ikki fingu ognað sær Landastrok. Øll eintøkini vórðu seld eftir stuttari tíð, og tað kann merkja, at tey ikki eisini vilja lata hetta spælið fara framvið.

**Fleiri spæl í væntu**

Enn er eingin endalig avgerð tikin, men teir báðir tykjast av álvara at hava fingið hug til føroyska spælmarknaðin. Í øllum førum eru teir alt annað enn avvísandi, tá tosað verður um framtíðar útgávur.

- Vit halda, at tørvurin á føroyskum spølulm er stórur. Og tað hevur eisini víst seg, at er vøran í lagi, so er eftirspurningurin avgjørt til staðar. Sjálvir hava vit eisini einar tvær aðrar útgávur í tonkunum, og uttan at siga alt ov nógv, so kunnu vit helst siga, at talan um ikki alt ov langa tíð verður um eitt føroyskt strategi-spæl. Um tað kemur á marknaðin longu komandi ár, tora vit tó ikki at staðfesta. Men ætlanirnar eru longu klárar, staðfesta teir báðir at enda.

**Menninir handan Kánus**

**Mikkjal Helmsdal**
Føddur 14. juni 1964
Hugskotsmenning og spurningar
Útbúgving: Cand. mag. í leiklistafrøði og føroyskum
Eigur og rekur fyritøkuna Mentir

**Hannis Egholm**
Føddur 28. juli 1960
Hugskot og grafikkur
Útbúgvin arkitektur
Eigur og rekur lýsingafyritøkuna Sisero





Øll vita, hvat tað merkir at standa sum kánus.
Men hvat merkir **KÁNUS**?

Og kann ein siga "mann kann siga" á føroyskum? Er blíva eitt føroyskt orð? Hvussu eitur spónur í fleirtali? Hví eitur vinstra síða á báti bakborð? Og hví eita grønar keks grønar keks? At fáa durafjórðingin merkir at blíva útblakaður, men hvat er ein durafjórðingur?

**KÁNUS** er eitt undirhaldandi spæl um føroyska málið. Her fært tú á ein stuttligan og áhugaverdan hátt møguleikan at økja ansin og vitanina um føroyska málið, tess røtur og tess dagligu nýtslu.

Við 2880 spurningum er tilfar til nógv long og spennandi kvøld, har familja og vinir kunnu savnast til ein lívligan dyst í vitan um talumál, fakmál, orðatøk, tiltøk, upprunan til kend orð og týdningin av minni kendum orðum.

**KÁNUS** er eitt frálíkt høvi at savnast, stuttleika sær saman og kappast um kunnleikan í hesum, sum vit fáast við og brúka hvønn tann einasta dag. Mál okkara.

... greið tala! Kánus

**Í spæleskjuni er:**

- 1 spælipláta
- 6 flytibrikkar í ymsum litum
- 36 próvbrikkar
- 1 terningur at ringla við
- 480 spurna- og svarkort, hvørt við 6 spurningum - tilsamans 2880 spurningar
- Spælireglur




Svara spurningunum á lepanum høgrumegin og send lepan til Sosialin, so ert tú við í lutakastinum um hesar vinningarnar:

1. Ein ferð fyri 2 vaksin og 2 børn við Atlantic Airways
2. 5×1 eintak av Kánus

SISERO 251805

Hvønn leygardag inntil 17 desember verður kappingin í blaðnum. Fleiri seðlar geva størri møguleika at vinna. Drigið verður í Miðlahúsinum mikudagin 28. desember kl. 14.

... greið tala! Kánus

- (Reyður) At gera eitthvørt *út í æsir* er at gera tað fult og heilt. Merkir æs uppruna-liga 1) *hol fyri tveingi á húðar- ella rotuskógvi*, 2) *fingur* ella 3) *árablað*?
- (Svartur) Tá sjómenn tosa um *budingsaftan*, meina teir so 1) *leygardag*, 2) *mikudag* ella 3) *fríggjadag*?
- (Gulur) Tá eitt tónleikaverk verður *skipað* ella lagt til rættis fyri t.d. kór ella *orkestur*, eitur tað so at verkið verður 1) *avsett*, 2) *umsett* ella 3) *útsett*?
- (Hvítur) *Tað var um reppið*, merkir tað var líka við. Er eitt *repp* 1) *ein grýta*, 2) eitt *lítið mið, plinkur* ella 3) *ein troyggja*?
- (Grønur) Um onkur *er góður at senda eftir deyðanum*, er hann so 1) *sera fittur*, 2) *sera seinførur* ella 3) *sera átufrekur*?
- (Bláur) Bøndur kunnu ofta tosa um fleiri *bøgir*. Er *bøgir* fleirtal av 1) *bøur*, 2) *boksl* ella 3) *bógvur*?

**Røttu svarini eru:** (set kross) **Kánus 01**

| | | | |
|---|---|---|---|
| (Reyður) | 1 | 2 | 3 |
| (Svartur) | 1 | 2 | 3 |
| (Gulur) | 1 | 2 | 3 |
| (Hvítur) | 1 | 2 | 3 |
| (Grønur) | 1 | 2 | 3 |
| (Bláur) | 1 | 2 | 3 |

Navn

Bústaður

Send til: Sosialurin "Kánus" • Postboks 76 • 110 Tórshavn
innan 27. desember 2005